TING-HELLAN

*broytingaruppskotið er til viðgerðar í tinginum ".* Hetta er skelkandi lesnaður frá einari tingnevnd: Her stendur snøgt sagt, at fyrisitingin skal sita hendur í favn, til uppskotið er samtykt í tinginum, tí so verður fyrisitið eftir núverandi politiska viljanum, ikki neyðturviliga eftir galdandi reglum.

Men hvat embætisfólk, vinnulívsfólk og tingfólk *hugsa* og *halda* og *meina* um, hvussu lógin átti at verið, ja tað er óviðkomandi fyri viðgerðina av Thomas Nygaard-málinum, ið skal viðgerast eftir galdandi reglum.

**Avgerð ella skiftisreglu**

Tær umsóknir, sum ikki eru avgjørdar, tá ið lógin verður lýst, skulu viðgerast eftir nýggju ásetingini, uttan so ein skiftisregla verður sett inn í lógina, t.d. at umsóknir, sum eru komnar inn áðrenn lógin var endaliga samtykt skulu viðgerast eftir núverandi heimildum. Hvat nú, um umsøkjarin stendur eftir við svarta peri, t.e. einum skipi, sum ikki ella illa slepst av við? Er alt farið reglurætt fram, t.d. at fyrisitingin ikki hevur brúkt óneyðugt drúgva tíð, ja so er einki at gera. Hinvegin, um drál í fyrisitingini hevur við sær figgj arligan miss, so kann umsøkj arin krevja myndugleikan eftir endurgjaldi, líka mikið um talan er um ótilætlað ella tilætlað drál.

Tá ið talan er um tilætlað drál, skrivar áður nevndi Poul Andersen: *"Tað kann eisini gerast ein spurningur* ***um****, hvort tann umsokjarin, sum verður raktur av drálinum, beinleiðis kann gera rættarstøðu sína galdandi hóast [eina noktandi] avgerð á nýggja grundarlagnum ",*

tað vil í hesum føri siga – um tað verður staðfest, at talan hevur verið um tilætlað drál og at skipið átti at fingið veiðiloyvi sambært núgaldandi reglum – at umsøkjarin kann gera krav uppá, at "Thomas Nygaard" fær loyvi, *hóast* nýggju reglurnar eru komnar í gildi. Landsstýrismaðurin hevur sjálvandi altíð *politisku* ábyrgdina fyri umsitingini av einum málsøki. Tá ið talan er um tilætlað drál, so kann eisini verða talan um ábyrgd eftir revsilógini, t.v.s., at tilætlað drál kann verða roknað sum kriminelt.

Hvørt "Thomas Nygaard" skal hava veiðiloyvi ella ikki, er ein avgerð, sum Fiskimálaráðið eigur at taka. Antin eitt væl grundað, noktandi svar ella eitt játtandi svar. Tað er ikki sømiligt at velja at lata vera við at taka eina avgerð fyri harvið at røkka tí úrsliti ein ynskir. Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hevur endaligu ábyrgdina. Hann hevur í hvussu er nakað at hugsa um, nú lógaruppskotið verður samtykt. Og skotbráið er stutt. Fyri hann og fyri álitið á fyrisitingina og politisku skipanina yvirhøvir er at vóna, at hann ikki endar sína politisku karrieru sum BjørNinn Kalsø .. .

# Lógin um vinnuligan fiskiskap

Lógin um vinnuligan fiskiskap kom í gildi í 1994. Fiskirikidømi undir Føroyum er ogn Føroya fólks, og endamálið í umsitingini av hesum ríkidømi er at gagnnýta tilfeingið burðardygt lívfrøðiliga og búskaparliga, og í viðmerkingunum sæst, at hettar skal gerast á marknaðartreytum.

**Veiðiloyvi**

Í lógini um vinnuligan fiskiskap verður hvørt einstakt fiskifarið skil-markað sum ein eind við einum veiðuloyvi. Veiðuloyvi er knýtt at skipinum og hevur tvinnanda tættir:

c) Veiðuloyvi er eitt slag av skrásetingarskjali frá myndugleikan-um, ið sigur at tú hevur rætt til at fiska; t.v.s., uttan veiðiloyvi, eingin fiskiskapur, men veiðiloyvi í sær sjálvum er ikki nóg mikið, bara fortreytin. Tú mást hava fiskiloyvi omaná so at siga (sí niðanfyri)
d) Veiðuloyvi ásetur, hvussu stórt fiskifarið í mesta lagi kann vera. Tey fiskifør, sum vóru í flotanum, tá ið lógin kom í gildi, fingu veiðiloyvi, og støddin á hvørjum einstøkum skipi avgjørdi støddina á veiðiloyvinum

**Fiskiloyvi og -dagar**

Hvørt einstakt fiskifar síni egnu, avmarkaði fiskirættindi; upprunaliga var hettar sum kvota (tons), men seinni var hettar broytt til fiskidagar. Tey fiskifør, sum vóru í flotanum í 1994, fingu sum nevnt veiðiloyvi og tillutað ávíst tal av fiskidøgum (línuskip t. d. 120, bátar 15-40 BRT 80 o.s.frv.), og hettar er fiskiloyvi við so og so nógvum døgum.

**Umseting av fiskidøgum**

Fiskidagar kunnu avhendast (seljast ella leigast) frá einum fiskifari til annað. Men ikki púra frítt. Lógin hevur tvey uppbýti. Annað er millum trol og húk, og har er reglan tann, at ein húkafar kann ikki avhenda dagar til trolfar ella øvugt.

Hitt uppbýtið er *innanfyri* ávikavist húk og trol, har verður býtt upp í skipastøddir. Fyrst er at siga, at 15 tons er markið millum smábátar (bólkur 5) og aðrar, og lógin setur fullkomið bann fyri at selja fiskidagar um hetta mark. Halda vit okkum til húkaflotan, so vóru bólkarnir upp-runaliga bólkur 4A (15-40 BRT), bólkur 4B (40-110 BRT) og bólkur 3 (størri enn 110 BRT). Her kundu fiskidagar umsetast frítt, tó ikki tvørtur um 40 tons-markið. Tá ið fiskidagar verða umsettir millum fiskifør, sum eru ymisk til støddar, so verður umroknað eftir eini talvu, ið er grundað á rúmmetrar. Keypir t.d. eitt línuskip 100 dagar frá einum 20 tonsara, so fær línuskipið 35 dagar burturúr.

Í 2002 var 40 BRT-skottið tikið burtur, og síðani hava línuskipini keypt ein stóran part av døgunum hjá serliga 20 tonsarunum. Í løgtinginum liggur eitt uppskot um at seta skott í aftur við 110 tons, soleiðis at dagar ikki kunnu avhendast tvørtur um hetta mark. Tað er ein treyt fyri at kunna avhenda fiskidagar — líka mikið um tað er endaligt ella til leigu — at tann, sum avhendar, hevur brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðu fiskidøgunum í undanfarna fiskiári.

**Flyting og samanlegging av veiðiloyvum**

Sambært §8 er loyvt at flyta og/ella leggja veiðiloyvir saman.

5) Tað er loyvt at flyta veiðuloyvi av einum fiskifari yvir á eitt annað, sum ikki hevur veiðiloyvi
6) Tað er loyvt at flyta veiðiloyvi av einum fiskifari yvir á eitt annað fiskifar, sum hevur loyvi (samanlegging)
7)
10) Tað er loyvt at flyta tvey veiðiloyvi yvir á eitt fiskifar, sum ikki hevur veiðiloyvi (í upprunalógini stóð bara "veiðiloyvi", ikki "tvey veiðiloyvi", t.v.s. at fleiri loyvir kundu leggjast saman, men hettar var broytt í 1999)
13) Verður eitt fiskifar lagt med alla ella strika úr skipaskránni, so er loyvt at liggja inni' við loyvinum í upp til tvey ár uttan at tað verður flutt á annað fiskifar

Treytin er altíð, at fiskiorkan hjá skipinum, sum veiðiloyvi(r) verða flutt yvir á, hevur somu ella minni veiðu-orku, ongantíð størri. Tá ið tala er um `veiðiloyvi', so er talan um *upprunaloyvini frá 1994*, bæði tá ið tað kemur til tal av loyvum, men eisini støddina á tí einstaka loyvinum, so tann, sum hevur rættindi, veit, hvørj ar fortreytirnar eru fyri virkseminum.

Tað, sum er skrivað viðvíkjandi fiskidøgum omanfyri, tá ið kemur til umseting millum bólkar er eisini galdandi fyri veiðiloyvir: Flytast kundi ikki tvørtur um 40 BRT-markið, men tað varð avtikið. Sambært uppskoti frá landsstýrismanninum skal skott setast í aftur, soleiðis av veiðiloyvir undir 110 tons ikki kunnu avhendast til fiskifør omanfyri 110 tons og øvugt.

## Tamil-málið



*Tamil málið feldi í sínari tíð Poul Schlüter*

Tamil-málið snúði seg um, at løgmálaráðharrin Erik Ninn-Hansen ikki brýggjaði seg um eina áseting í útlendingalógini, tí ásetingin hevði óundansleppandi við sær, at fleiri útlendingar komu til landið; ásetingin gav flóttafólki rætt til sokallaða familjusamanføring, t.v.s. at fáa hjúnarfelaga og børn til Danmarkar, og var eitt sonevnt rættarkrav eins og tú t.d. hevur rættarkrav uppá fólkapensión, tá ið tú fyllir 67.

Tað var tí púra greitt – ikki minst fyri Ninn-Hansen, ið sjálvur er løgfrøðingur – at tað var ólógligt at nokta umsøkjarunum samanføring ella ikki at avgreiða umsóknirnar. Fyri at sleppa undan, at misálit varð reist ímóti sær, so royndi Ninn-Hansen at `dekka seg inn' í Fólkatingsins Rættarnevnd: Hann bað nevndina um undirtøku fyri, at *bert eitt avmarkað tal av umsóknum um familjusamanføring skuldi viðgerast á hvørjum ári.* Men Rættarnevndin tók ikki undir við Ninn-Hansen (løgfrøðiliga hevði tað kortini ongan mun gjørt, tí tað er ráðharrin og ikki tingið, ið hevði ábyrgdina fyri fyrisitingina av lógini). Erik Ninn-Han-sen bað kortini fyrisitingina drála, so at familjusamanføringarnar ikki vórðu framdar. Sum grundgeving brúkti hann, at talan var um at vinna tíð, eftirsum útlit vóru fyri, at støðan á Sri Lanka fór at batna í næstu framtíð. Hendi tað, so slapp Ninn-Hansen ikki bara undan at fremja familjusamanføringarnar, hann kundi eisini senda flóttafólkini (umsøkjararnar) heim.

Fyrisitingin gjørdi sum henni varð álagt. Umsóknirnar hópaðu seg upp, í allarflestu førum viðgjørdar til fulnar, men ikki avgreiddar, eftirsum eingin formlig avgerð varð tikin og fráboðað umsøkjarunum.

Fólkatingsins Umboðsmaður fekk klagur frá 37 umsøkjarum (tá lógu 123 mál í bunkanum). Umboðsmaðurin staðfesti, at hald var ikki í pástandinum um, at viðurskiftini á Sri Lanka fóru at batna, um tað mundið, tá ið avgerðin um niðurprioritering varð tikin. Hann staðfesti eisini, at tað sjálvandi ikki er ólógligt í sjálvum sær, at ein fyrisiting prioriterar, men

a) prioriteringin má

I hesum føri, staðfesti umboðsmaðurin, var talan var um ókomplicerað mál, ið vóru nóg væl upplýst, men sum høvdu tikið ósamsvarandi drúgva tíð (16 mánaðir ímóti vanliga 4). Talan var als ikki um nakað resursutrot, og at málini áttu at verið avgreidd fyri langari tíð síðani. Soleiðis sum umboðsmaðurin lýsir málið hava fleiri løgfrøðingar hildið tað vera løgið, at hann ikki helt seg hava grundarlag fyri at kunna staðfesta, at talan var um tilætlað drál. Seinni staðfestu bæði serligi kanningarrætturin og Ríkisrætturin, at talan var ólógligt drál.